## Mál úr 65 metrum

Dirk Kuyt skeyt sítt fyrsta mál í Liverpool búnanum, tá siðvanda felagið í gjárkvøldi tók seg upp á ovaru hálvu á stigatalvuni við sigri á Newcastle. Sigurin hjá Liverpool var uppiborin, men fram um alt, so verður tað málið til 2-0, sum tosið fer at snúgva seg um. Xabi Alonso hevði sæð, at Steve Harper var nakað langt út málinum, og úr 65 metrum sendi hann bóltin avstað. Given royndi at bakka, men ov seint var, og so stóð 2-0 á talvuni.

**-mørk**



## Start kom ikki í finaluna

Tað verður ikki í ár, at Start skal spæla sína fyrstu steypafinalu nakrantíð.

Start spældi í gjár á útivølli móti Fredrikstad, og hendan dystin vann heimaliðið 3-2.

Talan var um ein sera hendingaríkan dyst, har Start legði seg á odda 1-0, áðrenn Fredriksstad við tveimum málum tók leiðsluna. At Start á vegnum misti málverjan, bøtti sjálvandi ikki um støðuna, og hetta tóktist eisini blíva endaliga úrslitið.

Tíðin var um teir 92 minuttirnar, men sjey sekund áðrenn dómarin bríkslaði av, var Todi Jónsson upp á spæl. Og við einum góðum máli vissaði hann Start longda leiktíð. Við tíggju monnum gjørdist uppgávan tó sera tung, og tá Fredrikstad aftur legði seg á odda, sá meira enn svart út. Start spenti tó álopsbogan sera høgt, og tað kanska eyka trúgv, tá Frerikstad misnýtti brotsspark. Men tað í sjálvum sær var ikki nóg mikið hjá Start, sum nú er úti úr steypakappingini.

**-mørk**

EB/Streymur – B36 1-0

# Betra liðið tapti

**Leikliga sást yvirhøvur ikki, at tað var oddaliðið í Formuladeildini, sum tók í móti B36. Gestirnir vóru oman á frá byrjan til enda, men kortini var tað heimaliðið sum í síðsta enda sat við sigrinum í fanginum**

**FÓTBÓLTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Bæði B36 og EB/Streymur máttu byrja við hvør sínum lyklaleikara sitandi uttanfyri. Bárður Olsen hjá EB/Streymi og Bergur Midjord vóru báðir skaddir. Men meðan Bárður Olsen als ikki var við hjá EB/Streymi, so kom Bergur Midjord inn í seinna hálvleiki fyri B36.

Allan dystin á tamb var spenningurin øgiligur. Heimaliðið var undir stórum trýsti meginpartin av dystinum, men kortini vóru tað teir ríputtu úr Sundalagnum, sum stóð eftir við sigrinum.

B36 spældi ein fínan dyst, men teir vóru ikki nóg neyvir, tá møguleikarnir komu, og hóast dysturin leikliga var eitt tað lakasta avriki hjá EB/Streymi í ár, so høvdu teir neyuðuga hepni við sær, sum í síðsta enda eisini tryggjaði teimum sigurin.

### Vertirnir vandamiklari

B36 var betra liðið í fyrra hálvleiki, ongin ivi um tað, men kortini vóru tað vertirnir, sum vóru vandamiklari.

Teir kjansirnir B36 fekk, komu sum oftast eftir klossut verjuspæl, men ongantíð gjørdist veruligur vandi á ferð hjá René Tórðgarð í EB/Streymamálinum.

EB/Streymur hevði hinvegin heldur ikki so nógv at bjóða upp á frameftir vøllinum. Og tó, tá hálvur tími var leiktur fingu teir bóltin í kassan aftan fyri Jákup Mikkelsen.

Marni Djurhuus missur bóltin á miðvøllinum, men vinnur hann skjótt aftur og setir álopið í gongd.

Marni kemur sjálvur allan vegin framvið, og tað er eisini hann, ið leggur bóltin tvørtur um brotsteigin til Hans Paula Samuelsen, sum lættliga kann leggja heimaliðið framum.

Eftir hetta var um reppið, at EB/Streymur fekk okkurt málið aftrat, tí Arnbjørn Hansen rakti træverkið kring landsliðsmálverjan tvær ferðir áðrenn steðgin, men uttan at nakað meiri spurdist burtur úr.

Seinastu royndina fyri steðgin hevði Mikkjal Thomassen, men René Tórgarð var vakin og vardi fyri frálíka skotinum frá Mikkjali.



*Rafal Kwiecinski og Arnbjørn T. Hansen kunnu vera glaðir um, at tað eydnaðist teimum at vinna á Kenneth Jacobsen, Niels Joensen og hinum í B36*
*Mynd Sofus D. Johannesen*

### B36 á øllum

Í seinna hálvleiki sat B36 á øllum, og EB/Streymur hevði ikki ein erligan málmøguleika í seinna hálvleiki. Tað hevði B36 hinvegin.

Fyrst er Egil á Bø ikki nóg avgjørdur, tá hann undir trýsti frá Sylla, letur Fróða Benjaminsen bóltin, sum tó skjýtur beint framvið málinum. Og lítla løtu seinni er tað Sylla sjálvur, sum er nær við, men hansara stútari fer beint upp um.

Nakað inn í seinna hálvleik fekk Fróði Benjaminsen ein góðan møguleika aftrat, men hann skjýtur mitt á René Tórgarð.

Og seinasta stóra møguleikan átti Sylla aftur, men hansara skot uttan fyri brotsteigin, fer dygst framvið stongini.

Nærri enn tað kom B36 ikki, og soleiðis endaði fyrra hálvfinalan millum EB/Streym og B36 við einum sera, sera teprum sigri til heimaliðið.

Harvið er alt eisini opið til seinna hálvfinaludystin í Gundadali komandi mikukvøld, men áðrenn tann dagurin kemur, er ein landskappingardystur á skránni hjá báðum pørtum.

Har skal EB/Streymur vitja á Toftum og spæla móti botnliðnum B68, meðan B36 brestur saman við arvafíggindarnar úr HB.

### FAKTA

**EB/Streymur – B36 1-0 (1-0)**
**1-0:** Hans Pauli Samuelsen, 30.
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert Å. Hansen, Egil á Bø, Knút Vesturtún (Frøði Clementsen, 76.), John Heri Dam – Rafal Kwiecinski, Ronnie Samuelsen, Arnbjørn T. Hansen (Jørgen Meitilberg, 63.), Marni Djurhuus (Brian Olsen, 69.), Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel.
**Gult kort:** Ronnie Samuelsen.
**B36:** Jákup Mikkelsen – Kenneth Jacobsen, Herbert í Lon Jacobsen, Klæmint Matras, Alex dos Santos – Johan Ellingsgaard (Obele Okeke Onyebuchi, 83.), Mikkjal Thomassen, Fróði Benjaminsen, Niels Joensen, Hanus Thorleifsson (Bergur Midjord, 63.) – Amed Davy Sylla.
**Gult kort:** Mikkjal Thomassen, Niels Joensen, Alex dos Santos.
**Dómari:** Lassin Isaksen

## Rokilsi í seinna hálvleiki

Høvuðssamtaluevnið eftir dystin á Mølini í gjár, var rokilsi sum var miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Tað byrjaði, tá Alex dos Santos skumpar Gert Hansen um koll, og Hans Pauli og Ronnie Samuelsen eru skjótir yvir til Alex dos Santos at gera vart við sína ónøgd.

So gekk ikki nógv meiri enn eitt hálvt sekund áðrenn meginparturin av báðum liðunum stóð savna í einum trunka, har leiðarar og hjálparfólk annars royndu at toga menn sundur.

Tað gekk ein løta, har menn vóru heitir og skumpaðu undir hvønn annan, men tá tað var yvirstaðið, velur annars rímiliga væ ldømandi Lassin Isaksen at geva Alex dos Santos og Ronnie Samuelsen gult kort.

Gula kortið til Alex dos Santos er rættiliga óskiljandi, tí burtursæð frá at skumpa Gert Hansen um koll, so ger Alex dos Santos onki í øllum rokinum. Men gula kortið kann ikki vera givið fyri skumpið, tí EB/Streymur fekk ikki fríspark úr støðuni, men bara innkast.

Kortið til Ronnie Samuelsen er eisini rættiliga óskiljandi, tí Ronnie Samuelsen ger heldur onki í øllum rokanum, annað enn at rópa eitt sindur, men tað gjørdu allir, og tí er tað eitt sindur undarligt, at tað var júst hann, sum fekk gula kortið.

**-rwd**

# Nøgdir á hvør sín hátt

**Hans Pauli Samuelsen og Kenneth Jacobsen hjá B36 vóru báðir nøgdir eftir dystin í gjár, men á hvør sín hátt**

**FÓTBÓLTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kenneth Jacobsen hjá B36 var væl nøgdur við leikliga avrikið hjá B36 á vøllinum í gjár.

- Eg eri væl nøgdur við okkara spæl sum heild. Men vit hava truplut við at fáa bóltin inn, og fáa onki mál. Teir verja væl og fáa eisini kreditt fyri tað, segði høgri bakkurin hjá B36 eftir dystin.

### Lakasta avrikið í ár

Hinvegin er einsamalli málskjúttin hjá EB/Streymi langt frá nøgdur við teirra avrik.

- Nei, vit spæla als ikki gott, og tað er ikki langt frá, at hetta er nakað av tí vánaligasta, vit hava spælt í ár. Tó haldi eg, at vit kempa væl allan dystin, og tað er øgiliga týdningarmikið, at vit ikki fáa mál í móti okkum.

- Í fyrra hálvleiki kundu vit eisini fingið meiri enn tað eina málið, men nú eru vit altso á odda 1-0 til seinna dystin, har vit kunnu liggja og satsa upp á kontra, sigur Hans Pauli Samuelsen hjá EB/Streymi.

Um trýstið frá B36 verður eins nógv í tí dystinum, vita vit ikki sum støðan er nú, men sambært Kenneth Jacobsen, so kunnu teir í EB/Streymi gott rokna við hesum.

- Seinnu hálvfinaluna skulu vit hava. Vit fara at koyra upp á sama máta, tí í dag vantaðu bara málini og tey ætla vit at fáa komandi mikudag, sigur Kenneth Jacobsen hjá B36.

KYKMYNDIR

**Mál, rokilsi, hæddarpunkt og samrøður eru at síggja á www.portal.fo**